*Magni Arge, stjóri í Atlantsflog og nevndarlimur í Føroya Oljuídnað:*

# Oljuídnaðurin má vísa ein veruligan vilja

*-sum sýnir, at hann vitturliga vil fara inn í samstarv við føroysk feløg, ið vilja útvikla seg til at vera við í eini komandi oljuvinnu sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog. Hann heldur tað eisini vera altumráðandi, at føroyskt vinnulív finnur út av, á hvørjum økjum vit vilja vera við, hvussu støðið er í vinnulívinum og hvat vit skulu gera fyri at lyfta okkum upp á tað støðið, sum útlendski oljuídnaðurin krevur av okkum.*

JAN MULLER

Millum mongu luttakararnar á stóru oljuráðstevnuni, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum í farna mánað, var Magni Arge, stjóri í Atlantsflog og nevndarlimur í Føroya Oljuídnað. Hann er eisini limur í Oljuráðleggingarnevndini. Magni Arge luttók í tí stóra pallborðsorðaskiftinum seinasta stevnudagin og gjørdi hann har vart við fleiri rættiliga týdningarmiklar spurningar. Nú stevnan er farin nakað aftur um bak hava vit spurt Magna Arge, hvat hann heldur er týdningarmikið hjá okkum føroyingum og serliga vinnulívinum at geva gætur. Hann sigur:

-Tað, sum nú er fyri neyðini hjá føroyskum ídnaði, er at hann fer út og finnur fram til, á hvørjum økjum vit ynskja at gera okkum galdandi í eini komandi oljuvinnu - og síðani finnur út av á hvørjum stigi vit eru á í løtuni - í mun til tað, sum verður kravt av oljuvinnuni - og harvið vita, hvat skal til fyri at lyfta seg upp á tað neyðuga støðið!

Harnæst má tann altjóða oljuídnaðurin verða fullkomiliga opin fyri vísa vilja til at vera føroyskum feløgum til hjálpar konkret, soleiðis at tey fáa kvalifiserað seg og fáa lyft seg upp frá verandi støði til tað støðið, sum oljufeløgini krevja.

**Leitingin tað fyrsta**

Hvat viðvíkur teimum ymsu tíðarskeiðunum í eini komandi oljuvinnu, so heldur Magni Arge, at tað er leitingartíðarskeiðið, sum vit nú skulu til at hugsa um, tí hetta er tað, sum verður aktuelt fyri okkum í fyrstu atløgu.

Í leitingartíðini, sum kanska fer at vara í eini 10 ár, skulu vit byggja á ta verandi vinnulívið, sum longu er í Føroyum. Vit hava nevniliga nógv, sum meira ella minni er í familju við tað, sum oljuídnaðurin krevur, m.a. tí vit hava veitt veitingar til fiski- og skipaídnað gjøgnum so mong ár.

Tað er bara ein spurningur um at tillaga seg til tey serligu krøvini, sum oljuídnaðurin hevur.

**Størri krøv í menningartíðarskeiðinum**

Magni Arge vísir annars á, at vit fara at renna okkum inn í ein stóran trupulleika, tá vit koma til sjálvt menningartíðarskeiðið, tvs. tá nakað er funnið, og ein framleiðsla skal í gongd. Hesin trupulleiki er, at krøvini til alt tað, sum tá skal gerast, eru so ómetaliga stór, at hetta kollrennur føroyska samfelagið, áðrenn tú veitst av. Har mugu vit tí vera serstakliga varnir, men kanska meira ígjøgnum leitingartíðarskeiðið, og tá vit koma í eina útbyggingarfasu mugu vit til at hyggja eftir, hvar vit vilja vera við í eini framleiðslufasu. Henda varir yvir nógv ár, hon er støðug, og har kunnu vit síga við størri vissu, hvar vit vilja vera við.

**Breiða semja**

Magni Arge sigur víðari, at tað er ómetaliga týdningarmikið, at vit hava eina breiða semju í føroyskum politikki um, hvussu oljuregimið (lóggáva, reglur ol.) skal síggja út í Føroyum, soleiðis at tað verður minst møguligt av ófjóði millum oljufeløg og føroyingar sum so - at eisini føroyskur ídnaður finnur saman og identifiserar, hvussu ein vil arbeiða frameftir.

Hetta so sanniliga eisini fyri at sleppa undan, at vit draga í ymsar ættir, tí jú meira ymisk sjónarmið okkara eru um, hvussu gongdin skal vera, verri er tað oljuídnaðinum at vera okkum til hjálpar - og tess meira opna vit fyri, at oljuídnaðurin kann spæla okkum út móti hvørjum øðrum. Og tað gevur onga meining hjá okkum uppá longri sikt.

Magni Arge heldur somuleiðis, at oljufeløgini mugu gera sær heilt greitt, at tað er ikki nokk bara at koma við sjarmuoffensivum, halda fundir, tosa vakurt og bjóða til døgurða. Tað er ikki tað, sum kvalifiserar okkum at vera við uppá longri sikt.

*Framhald á síðu 10*



*Magni Arge var rættiliga avgjørdur, tá hann hevði orðið á pallborðsfundinum í Norðurlandahúsinum, bæði um leiklutin hjá okkum sjálvum og útlendska oljuídnaðinum í eini møguligari føroyskari oljuvinnu*

**Ja!** Send mær oljupakkan, sum eg gjaldi 1000 krónur fyri

☐ Viðl. kekki ☐ Postuppkrav ☐ Banka/gjróflyting

Navn: ........................................

Bústaður ........................................

........................................

Postnr. bygd/býur ........................................

........................................

Tel.: ........................................

Undirskrift: ........................................

Send lepan til:
Tíðindablaðið Sosialurin,
Box 76, 110 Tórshavn

Mennandi kjak krevur kunnleika;

Í Oljupakkanum fært tú alt tilfarið, sum hevur staðið í Tíðindablaðnum Sosialinum seinastu 25 árini um oljuvinnu og marknasamráðingar. Tilsamans fleiri enn 1200 síður í trimum ringbindum. Oljupakkin er á tremur við upplýsandi greinum, áhugaverdum samrøðum, viðmerkingum og øðrum. Skalt tú fylgja við í dag, mást tú eisini hava bakgrundina við – og hana fært tú frá Sosialinum fyri 1000 krónur!

**Bílegg tær oljupakkan nú – 1200 síður fyri 1000 kr.**

SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

**Skrivstovufólk**

Vegna Havnar Handverkarafelag søkja vit eftir skrivstovufólki M/K til at arbeiða 42 tímar um mánaðin.

Arbeiði umfatar bókhald, límaskráseting og annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Viðkomandi skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava kunnleika til bókhald og tekstviðgerð á EDV.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 1997.

SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUT. REVISORAR
TLF. 11917 · BOKS 81
Á GLAÐSHEYGGI · 110 TORSHAVN

**Fuglafjarðar skúli**

Søkt verður eftir vikari at byrja *beinanvegin* fyri lærara í sjukrafarloyvi skulaárið 1996/97 at enda.

Tímatalva:
4 t. da. í 10.b fl.
5 t. da. í 5. fl.
1 t. tilevning í 6. fl.
11 t. gentuitr. í 1.–8. fl.
4 t. ser.

Møguligar umsóknir eiga at vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. apríl kl. 16.

**Fuglafjarðar skúlanevnd**
v/ Terja á Lakjuni
530 Fuglafjørður

*Bergmenn*

Vit spæla til
*DANS*
*VEITSLUR*
*og annað*

*Vinarliga ringið* Tlf. 19194




*Magni Arge heldur tað hevur stóran týdning, at føroyingar standa saman, nú lunnar skulu leggjast undir eina komandi oljuvinnu*

*Framhald av síðu 3*

**Oljuídnaðurin má eisini vísa vilja**

Oljuídnaðurin má eisini vísa eitt „commitment" tvs. vísa eina ábyrgd og vilja, sum sýnir, at hann vitturliga vil fara inn í samstarv við føroysk feløg, sum vilja útvikla seg til at vera við í eini komandi vinnu.

Magni Arge heldur sjálvur, at føroyingar - nú tá løggáva og reglur skulu gerast - eiga at standa fast við, at vørur og fólk skulu fara um føroyska kei og føroyskan flogvøll út til pallarnar, tí tað er uppá tann mátan, at tú fært eitt tætt samband við oljuídnaðin.

Flytur tú tær tænasturnar til at fara gjøgnum skotska ella norska havn og flogvøllir, so missa vit alt hetta.

Men eisini annað so sum arbeiðsloyvi, tolling av vørum og trygdin gera tað neyðugt, at alt hetta verður um føroyskt øki og ikki bara millum eina útlendska havn og so pallarnar á havinum.

**Eina útgerðarhavn**

Hvat viðvíkur supplystøðum, so heldur Magni Arge, at vit í einum leitingartíðarskeiði neyvan hava brúk fyri meira enn eini slíkari støð.

Tað er umráðandi, at henda eina útgerðarhavnin er vælskipað til at veita eina dygga tænastu til oljuvinnuna, soleiðis at vit eru før fyri at lata nakað á einum støði, sum kravt verður aðrastaðni.

Vit mugu lata vera við at gera hetta til eitt stórt mál í Føroyum at klandrast um, nevniliga hvar ein møgulig støð skal liggja ella um tað skulu vera fleiri slíkar. Tað umráðandi er at hava eina vælvirkandi støð (basa), tí tá er allur føroyskur ídnaður innan fyri tveir tíma frá støðu til slíka støð, og tað er hetta, sum er tað avgerandi.

At skula klandrast um, hvar slík støð skal liggja, er alt ov lítið mál, tí tað eru nógv onnur meira týðandi ting at taka sær til enn tað.

Magni Arge heldur ikki tað er so avgerandi, antin henda støðin liggur í Suðuroynni, Vágum, Havn ella í Eysturoynni. Tað avgerandi er, at ein slík útgerðarhavn verður í Føroyum, og at hon verður vælskipað við so góðari tænastu sum gjørligt.

Tað er einasti mátin, har vit so kunnu siga við oljufeløgini, at vit hava eina effektiva tænastu, sum vit vilja veita tykkum.

**Kontant signal**

Magni Arge, sum var við á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í mars mánað, heldur tað vera rættiliga einastandandi, at tað kunnu møta 400 føroyingum til eina slíka ráðstevnu.

Tað er eitt ógvuliga kontant signal bæði til oljuvinnuna og føroyskar politikarar um, at føroysk vinna hevur stak stóran áhuga at koma sær uppí, har veitingar nú einaferð verða til oljuvinnuna.

Hvat viðvíkur óttanum fyri tí negativa árini ein slík nýggj vinna skal hava á føroyska samfelagið, so heldur Magni Arge, at vit sjálvandi eiga at taka øll fyrivarni, men tað verður so serstakliga í eini útbyggingarfasu.

Soleingi vit tosa um leiting dugi eg ikki at síggja tann stóran vandan. Hon er meira at meta sum eitt ískoyti til tað verandi vinnulívið og til arbeiðs- og vinnumøguleikar vit hava í dag og sum pláss er fyri. Men eg ivist stórliga í, at tað er nakar vandi á ferð í tí fasuni.

Har eg síggi vandan er tá tú kemur til eina útbygging, tí tá skal tú m.a. brúka so ómetaliga nógv fólk innan fyri stutta tíð. Tá tekur tað bara eina lotu at kollrenna alt. Tí skulu vit vera so stakvarnir, tá vit koma hartil. Men eg haldi tað vera ov tíðliga í dag at mála ein vissan upp á veggin.

*Her nøkur av umboðunum fyri stóra norska oljufelagið Norsk Hydro, sum vóru við á Oljuráðstevnuni. Talan er um fleiri av ovastu stjórunum í hesi risastóru fyritøku*

